

**Hvussu eitur tú:**
Ása Kathy Dam

**Hvaðani ert tú:**
Ættað úr Kollafirði

**Hvat hevur tú lisið:**
Sjúkrarøktarfrøði

**Hvar hevur tú lisið:**
Í "Høgskolen i Tromsø" (sum nú er ein partur av universitetinum, og tískil í dag eitur Universtitet i Tromsø, sykepleierutdanninga)

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan:**
Skúlin er býttur í fleiri partar innan fakið "helsefag". Fysioterapi, ergoterapi, sjúkrarøktarfrøði, tannlækni og medicin. Allir næmingarnir lesa í sama bygningi, men bygningurin er so deildur í "øki". Allir næmingarnir hava tó somu matarkantinu. Universitetssjúkrahúsið (UNN) er fast í bygninginum.

Mær dámdi væl, at øll hesi fakini vóru í sama bygningi, og at vit nýttu somu kantinu, tí so bleiv man kendur við fakbólkarnar og ferðaðist í sama umhvørvi. Eisini dámdi mær væl, at UNN er fast í skúlanum, tí tað gjørdi, at man bleiv kendur við sjúkrahúsið, og tískil bleiv hetta ikki so fremmant, tá man so var útbúgvin. (Læknar, sjúkrasystrar o.o. sum arbeiða á UNN brúka dagliga facilitetirnar á skúlanum so sum auditorium, bólkarúm og matarkantinu)

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið:**
Lestrarlívið er sum man ger tað sjálvur. Um man vil hava fest og balladu, so kann man tað, tí býarlívið í Tromsø hevur alt at bjóða ungum lesandi, sum hava ballfallera fyri eygað :) Tromsø hevur eisini ymiskar festivalar og onnur mentanartiltøk til ung lesandi. Eisni eru tiltøk á sjálvum universitetinum.

**Fyrimunir og vansar av at lesa har tú vart:**
Fyrimunir eru, at alt er savnað á einum stað. Tromsø er ein altjóða býur, og har er stór náttúra við góðum facilitetum til uttandura ítriv av øllum slag. Veturin er góður og kaldur við nógvum kava. Har er gott busssamband, og tað er eitt multikulturelt stað, samstundis sum býurin er skandinaviskur og tískil gevur ein vissan tryggleika fyri ein føroying (í øllum førum meg)

Vansar eru, at sjálvt um býurin geografiskt ikki er so langt frá Føroyum, so er tað langt og dýrt at ferðast ímillum. Økonomiskt loysir tað seg ikki at arbeiða í Føroyum eina summarferiu. Ynskir man at vera saman við føroyingum, meðan man lesur, so er Tromsø ikki rætta staðið. Meðan vit lósu vóru tríggir aðrir føroyingar umframt okkum. Harafturat hevur ein lesandi í Tromsø (Noreg) ikki somu økonomisku fyrimunir sum lesandi í DK.

At lesa norskt er onki problem, tí tað líkst nógv donskum. Norðnorska dialektin var tó ring at skilja í byrjanini, men man finnur skjótt útav, at tað líkist NÓGV føroyskum.

Ein stórur fyrimunur er, at vetrar-eksamiurnar eru áðrenn jólaferiuna. Lesnaðurin er nevniliga býttur í 2 semestur per ár : "vår" frá jan-juni og "høst" frá aug-des.

*Lagt til rættis:*
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*




**Hvussu eitur tú:**
Tummas Samró

**Hvaðani ert tú:**
Hoyvik

**Hvat lesur tú:**
International Bachelor Economics and Business Economics

**Hvar lesur tú:**
Erasmus University: Rotterdam Holland

**Hvussu kanst tu lýsa skúlan:**
Tað er ein altjóða skúli við fólki frá allari verðini. Skúlin er ógvuliga krevjandi. Tað eru endaligar royndir sjeyndu hvørju viku, og testir eru aðruhvørju viku. Hetta er sostatt ein skúli fyri fólk við ambitiónum.



**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið:**
Tað er nógv at gera í skúlanum, men hóast tað, er eitt ríkt studentalív her. Tað snýr seg bara um at vera íðin og málrættaður, og leggja sær tíðina væl til rættis. Býurin hevur nógv at bjóða lesandi, og tey sonevndu "student council" skipa fyri nógvum stórum tiltøkum hvørja viku.

**Fyrimunir og vansar av at lesa har tú ert:**
Ein vansi er, at her er ongin góða mamma, tí umleið 70% av studentunum verða sáldað frá eftir fyrsta árið.

Fyrimunir við at vera her er, at tú kanst skapa tær gott netverk. Tú fært eisini altjóða virðing, tí innanfyri business-útbúgvingar er Erasmus eitt av hægst mettu universitetunum í Evropa. Lestrargjaldið og studentalívið er bíligt í mun til onnur lond, sum t.d. Ongland og Amerika.

**Hvussu eitur tú:**
Sølvi Jespersen

**Hvaðani ert tú:**
úr Sørvági

**Hvat lesur tú :**
Í løtuni eri eg á mínum 3. ári á lestrarlinjuni "BA in Information Management" á Copenhagen Business School (CBS). Tað var innan hetta, at eg var eitt semester sum skiftisnæmingur.

**Hvar hevur tú lisið:**
Havi tikið eitt semester í Singapore á skúlanum "Nanyang Technological University" (NTU)

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan:**
NTU liggur 20 min. uttanfyri Singapore centrum. Skúlin sjálvur hevur nógvar ymsar linjur, ið hava eitt breitt úrval av ymsum útbúgvingum. Jura, IT, list, samskiftis-tøkni, business, engineering o.l.

Tú tekur so ymisk fak á teimum ymsu "undir-skúlunum", ið liggja á campus.

Eg býtti tíðina á NTU millum tveir undir-skúlar. "Wee Kim Wee school of communication and information" og "School of Art, Design and Media".

Skúlin er sera stórur. Tað ganga umleið 28.000 næmingar á skúlanum og harav búgva 8000 á campus, har eg sjálvur búði. Tað var ringt at venja seg við støddina á skúlanum og talið á næmingum. Bussar koyra runt á campus, tí ofta er tað bæði ov heitt og ov langt at ganga ímillum klassarnar. Skúlin hevur allar modernaðar hentleikar, ið eru frammanfyri t.d. CBS. Eitt ótal av kantinum, har tað er sera bíligt at eta góðan, lokalan mat. Skúlin hevur enntá egin Mc Donalds, Pizza Hut og Subway, ið bara eru opin fyri næmingum.

Øll undirvísing er á enskum, og lærarnir eru ymsastaðni úr heiminum. Mínir fýra høvuðslærarar vóru ein amerikanari, ein indari, ein singaporeanari og ein kinesari.

Alt skúlaarbeiði fyrigongur í bólkum, og tú verður koyrdur í bólk saman við teimum lokalu. Tað kann vera sera áhugavert, men eisini avbjóðandi, at arbeiða sum einasti útlendingur í einum lokalum bólki. Men tey eru altíð sera blíð og fólkalig, líkasum øll onnur í Singapore.

**Hvussu kanst tú lýsa lestarlívið**
Lestrarlívið í Singapore er nakað øðrvísi enn tað, man er vanur við frá CBS.

Eg búði á campus og hevði kamar saman við einum Singaporeanara. Tað var sera spennandi og læruríkt – tí hóast Singapore er eitt nýmótans samfelag, eru tey øðrvísi enn vit.

Tey lokalu á skúlanum eru sera íðin eftir at klára seg allarbest og hugsa ikki um nógv annað enn skúlan. Tey lokalu vóru undir stórum trýsti á skúlanum, tí tað væntast av teimum, at tey klára seg best og einki annað er nóg gott. Av tí sama sá man einki til tey lokalu uttanfyri skúlatíð.

Men NTU hevur eisini eina rúgvu av øðrum skiftislesandi úr øllum heiminum. Tað sosiala lívið millum okkum var sera gott og av tí, at tey lokalu vóru so upptikin, var tað serliga hinum skiftislesandi, eg brúkti tíðina saman við.

**Fyrimunir og vansar við at lesa har, tú ert/vart**
Ein fyrimunur var, at tú komst at uppliva eina heilt aðra mentan, langt heimanífrá. Tad var sera læruríkt og gevandi. Singapore



liggur í hjartanum av Suður Eystur Asia (SEA), og tað ger, at tað er sera bíligt at ferðast runt til nábúgvalondini, bert 150-300DKK fyri flogbilletina. Eg nýtti tí næstan hvørt vikuskifti at ferðast til onnur lond saman við øðrum skiftislesandi. Thailand, Malaysia, Vietnam, Laos, Indonesia o.a. Tú knýtur sera tøtt vinarbond við hini skiftislesandi, eftirsum tey ofta eru tey einastu, tú fylgist vid. Tað kann ofta vera syrgiligt, tá árið er av, eftirsum man ikki veit nær/um man sæst aftur. Men tað er uttan iva vert tað.

Veðrið er ein stórur fyrimunur og ein stórur vansi! Í byrjani var tað hart at venja seg við 32-35 hitastig hvønn dag og 85-90% luftfugtigheit. Men eftir 3 vikum hevði eg vant meg við tað, og neyt at spasera runt í shorts og sandalum hvønn dag!

Singapore er ein av heimsins tryggastu býum – har er so gott sum eingin kriminalitetur. Tað ger, at tú kanst ferdast tryggur allastaðni.